## Tølini lúgva

Tá eitt lítið korter var eftir av dystinum í Gundadali, varð Magni Jarnskor sendir á vøllin fyri GÍ. Hetta var fyrsta ferðin í tvey kappingarár, at Magni er á vøllinum fyri besta GÍ-liðið, og eftir dystin duldi veteranurin ikki fyri, at tað hevur verið tungt at sitið uttanfyri í ár, meðan skaði hevur forðað fyri einum coma-back til bestu deildina.

- Ikki minst var tað tungt í dag, tá vit spæla okkum fram til somikið góðar møguleikar, uttan at fáa nakað afturfyri. Ikki minst tí hinir vóru effektivir, tá teir fingu møguleikan.

Men tað er kanska júst tað, sum er munurin, tá talan er um tvey lið úr hvør sínum enda á stigatalvuni?

- Tað er tað kanska. Tað virkar onkursvegna, sum gerast skeivu menninir frír. Høvdu vit t.d .vunnið tríggjar dystir á rað, heldur enn at tapt tríggjar, so ivist eg ikki í, at hasir bóltarnir høvdu sitið betri, staðfestir Magni.

Men hóast tapið og botnsessin, so vil veteranurin á GÍ-liðnum á ongan hátt geva skarvin yvir.

- Tað hava vit so ongar ætlanir um. Har eru nógvir positivir lutir, sum vit kunnu arbeiða víðari við. Mistøkini mugu vit so bara læra av og annars leggja aftur um bak. Skal metast eftir dystinum í dag, so manglar tað bara heilt lítið í, áðrenn vit fara at vinna nakrar dystir, og í øllum førum haldi eg ikki, at 3-0 var eitt úrslit, sum gevur eina rætta mynd av dystinum, staðfestir Magni Jarnskor at enda.

-jm

B36-GÍ 3-0 (1-0):

# Hepni skal til

**Hóast 3-0 móti botnliðinum ljóðar sum ein sannførandi sigur hjá oddaliðnum, so munnu tey í B36 ásanna, at hepnið í fleiri førum var størri enn skilið sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Fótbóltur kann til tíðir vera eitt løgið spæl. Fyri bara trimum vikum síðani tapti eitt sera tannleyst GÍ-lið 3-1 fyri HB í einum dysti, har gestirnir hvørki maktaðu eitt ella annað, og har spælið gav meira enn eina ábending um, at gøtumenn væl kunnu risikera at spæla í aðru deild næsta kappingarár.

Sunnudagin var GÍ aftur í Gundadali. Hesaferð var mótstøðuliðið B36, men hóast 0-3 tapið fyri oddaliðnum, so var talan um eitt munandi betri avrik hjá GÍ. Og í nógvar mátar mnnu tey í B36 kenna seg heppin, at tey soleiðis fingu loyvi at halda øllum stigunum.

### Vandamikil kontra

Serliga fyri steðgin vóru tað nevnliga gestirnir, sum stóðu fyri tí mesta. B36 hevði ivaleyst ætla sær at leggja eitt høgt trýst á GÍ í vónini um at køva botnliðið alt fyri eitt, men hendan ætlanin tóktist vera fullkomuliga miseydnað.

Partvíst, so megnaði B36 ikki at hava trýstið nóg breitt, skilt á tann hátt, at gøtumenn við eini einstakari sending aloftast kundu spæla seg undan hesum.

Hartil, so vórðu gøtumenn als ikki komnir til Havnar bara fyri at grava seg niður. Í eini 4-4-2 uppstilling, har Krzystof Popczynski var annar av álopsmonnunum, og har Súni Olsen hevði funnið sæti á miðvøllinum, megnaðu teir ferð eftir ferð at senda vandamikil kontra móti B36 málinum, so skjótt B36-trýstið var brotið. Og bæði eina, tvær og tríggjar ferðir átti hetta eisini at givið úrslit, men óneyvleiki í avgerandi løtunum førdu við sær, at Jákup Mikkelsen ikki slapp so frætt sum at vísa, at hann skal roknast sum besti málverjin í landinum. Ikki minst gav tað gestunum gott pláss í hesum partinu av spælinum, at bakkarnir hjá B36 í besta Carlos-stíli støðugt leitaðu niðan á vøllin. Tað merkti í veruleikanum, at í flestu kontra-støðunum spældi GÍ tveir móti tveimum, og tá annar hesum altíð æt Popczynski, spældi B36 at kalla við eldin.

Tað skuldu ganga 20 minuttir, áðrenn B36 hevði sítt fyrsta veruliga gjøgnumspæla álop, og tó at hetta ikki kastaði mál av sær, so sýndi oddaliðið fleiri ferðir, at teir eru sterkir í deyðbóltsstøðum. Ikki minst, tá Santos ta einu ferðina sendi hornaspark innfyri, sum fór millimetrar framvið høvdinum á einum leysum Mikkjal Thomassen, men hóast hesa ávaring, so slapp B36 at nýta júst somu kombinatión, tá teir løgdu seg á odda.

### Gav B36 frið

Málið gav sjálvandi B36 nakað av luft, og eftir hetta løgdu teir seg eitt vet longur aftur á vøllin. At ein hálvskaddur Óbi varð skiftur út, gav eisini nakað meira tyngd í miðvøllin, og tí gjørdist vegurin til kviku kontra-álopini frá gøtumonnum ikki eins stuttur.

Gestirnir vóru tó framhaldandi væl við í dystinum, og einar tvær ferðir mátti Jákup Mikkelsen vísa kynstur síni í málinum, áðrenn B36 brádliga avgjørdi dystin. Allan Mørkøre spældi hegnisliga mitt ímillum til Berg Midjord, og eins hegnisliga slapp hann sær leysan av verjuni, áðrenn hann sendi málverjan ein veg og bóltin annan.

Hetta tók mest sum luftina úr GÍ-trýstinum, men seinastu løtuna kom tó nakað av spenningi í aftur. Mikkjal Thomassen var alt annað enn samdur í dømingini ígjøgnum dystin, og tá hann gav hetta til kennar yvir fyri dómaranum, fekk hann ostaskorpuna sum tøkk. Eftir hetta flutti GÍ nógv fólk fram. Einar tvær ferðir høvdu teir vandamiklar frísparksstøður, og eina ferð mundi Súni Olsen kenna seg snýttan fyri brotsspark, men endaliga punktumið slapp Allan Mørkøre tó at seta, tá hann varð sendir blankur avstað frá miðvøllinum.

### Enn er alt opið

Skal ein niðurstøða gerast við støði í dystinum, so má

# Sterkir í verjuni

Hóast tað nakrar ferðir fyrstu løtuna stóð nógv á hjá B36, so helt liðskiparin, Pól Thorsteinsson, ikki, at tað var hepni, sum tryggjaði teimum sigurin.

- Eg haldi, at vit hava tamarhald á teimum. Teir hava nøkur vandamikil kontra, men tá vit fyrst skora, so hava vit teir har, sum vit vilja hava teir.

Tað ljóðar, sum er sjálvsálitið á leikarunum í lagi, og tað staðfestir Pól eisini, tá spurt verður um hugburðin hjá leikarunum til uppgávurnar.

- Tað er kanska serliga, tí vit hava staðið okkum so væl í verjupartinum, at vit hava trúgv upp á egin evni. Partvíst, so eru vit væl mannaðir í verjuni, og partvíst hava vit eisini Jákup, sum higartil hevur tikið at kalla alt tað, sum hini hava skotið eftir honum. Akkurát hann er kanska størsti styrkurin, sum vit hava fingið yvirhøvur, heldur Pól.

Komandi vikuna skal B36 fyrst vitja á Skála, áðrenn teir taka ímóti HB, og Pól ivast heldur ikki í, at hetta verða tvær veruligar styrkisroyndir hjá liðnum.

- Enn er sjálvandi nógv eftir, men hesir báðir dystirnir fara nokk at geva eina ábdning um, hvat lið fer at liggja heilt frammi komandi vikurnar.

Men tann fyrsta av hesum mugu tit so klára tykkum uttan Mikkjal Thomassen?

- Tað er sjálvandi ein missur, tí Mikkjal hevur spælt væl. Men vit hava so eisini aðrar spælarar. Klæmint spælir í miðjuni í dag, og Ingi er so eisini har, so eg haldi avgjørt, at vit hava ein sterkan hóp, har vit kunnu tola onkra fráveru, sigur Pól Thorsteinsson at enda.

-jm